fylgiskjal 24

UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Heilsu- og innlendismálaráðið
FO-100 Tórshavn

himr@himr.fo
hilmarh@himr.fo
paborg@himr.fo
kristvor.poulsen@himr.fo

Tórshavn, tann 7. juni 2018
J.nr.: 18/00160
At tilskila í svari
Viðgjørt: SPS
Tygara skriv:

**Viðv.: Hoyringssvar viðvíkjandi uppskoti til náttúrumargfeldislóg**

Uppskotið nemur við fleiri økir undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, og skal ráðið við hesum gera hesar viðmerkingar til uppskotið.

**Yvirskipað**
Yvirskipað skal viðmerkjast, at tørvur er á, at atlit at náttúrumargfeldinum fær størri ans eisini í lóggávu og fyrisiting.

Tann lóggávuháttur, sum nýttur verður í lógaruppskotinum, t.e. tvørgangandi lóg í staðin fyri geiralóg, kann hava fyrimunir við sær, men kann eisini hava vansar við sær við tað, at fleiri myndugleikar skulu viðgerða og meta um somu spurningar, og at tað kann verða ivasamt, um og í hvønn mun ymsir mynduggleikar kunnu taka atlit at náttúrumargrfeldinum.

Skal ætlanin við lógaruppskotinum røkka á mál krevst størri vitan á økinum.

**Meginreglurnar í § 8- 12 í uppskotinum**
Eftir § 8-12 í uppskotinum eru ásettar meginreglur fyri almennum avgerðum, sum viðvíkja náttúrumargfeldinum. Tað snýr seg m.a. um meginreglur fyri vitanargrundarlagið fyri avgerðum og meginreglu um fyrivarni.

Tað fylgir av § 7 í uppskotinum, at meginreglurnar í §§ 8 til 12 í uppskotinum skulu havast sum leiðreglur, tá ið almennur myndugleiki verður útintur, m.a. fyrisitingarligar avgerðir og fyristingarliga ásettar almennar rættarreglur (kunngerðir).

Í viðmerkingunum í uppskotinum til § 7 framgongur, at meginreglurnar skulu nýtast sum leiðreglur fyri meting eftir margfeldislógini ella øðrum lógum, og at tær sostatt ikki galda beinleiðis, men at tað eru tær operativu ásetingarnar - annaðhvørt í margfeldislógini ella í øðrum lógum - sum gera av, hvør ábyrgd heilt ítøkiliga verður løgd á tann einstaka.

Aling er dálkandi virksemi, sum hevur avleiðingar fyri náttúrumargfeldið.

Lóggávan um alivirksemi er í stuttum skipað soleiðis: Umhvørvisstovan tekur sær av umhvørvisatlitum eftir umhvørvisverndarlógini, veterinerdeildin hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni tekur sær av fiskasjúkuatlitum eftir djórasjúkulógini meðan aliumsitingin hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni gevur aliloyvi eftir alilógini, sum er yvirskipaðað lógin, har

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 00 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

umhvørvisatlit og fiskasjúkuatlit millum onnur atlit í eini samlaðari meting ganga inn í metingina.

Kravið í § 8 í uppskotinum til margfeldislóg um vitanargrundarlagið er ískoyti til kravið í vanligum fyrisitingarrætti um skyldu hjá myndugleikanum at útvega neyðugt upplýsingargrundarlag.

Vitanargrundarlagið eftir § 8 í uppskotinum skal snúgva seg um stovnsstøðuna hjá sløgum, útbreiðsluna og tann vistfrøðiliga standin hjá náttúrusløgum og virknaðin av árinum, og atlit skal takast til hesi viðurskiftini, tá avgerð verður tikin eftir alilógini, djórasjúkulógini og umhvørvislógini.

Hetta er vitan, sum í stóran mun manglar í dag, sbr. niðanfyri um avleiðingar av uppskotinum. Áðrenn slík vitan er útvegað er spurningurin, hvønn týdning hetta kravið um vitanargrundarlag og um meting í praksis fær í mun til ta praksis, sum er í dag.

Lóggávan viðvíkjandi alivirksemi er eins og lóggávan á øðrum økjum yvirhøvur í stóran mun sektorbaserað, og ein tulkingarmeginregla er galdandi um, at ein fyrisitingarligur myndugleiki ikki kann nýta sína metingarheimild at røkja endamál, sum aðrir myndugleikar hava sum serliga uppgávu at røkja.

Eftir uppskotinum tykist tað, sum at tað ikki bert skal vera ein myndugleiki, t.d. umhvørvismyndugleikin, sum skal síggja til, at atlit til náttúrumargfeldið verða tikin, men at hesi atlit skulu intergrerast á øllum økjum, sum hava avleiðingar fyri náttúrumargfeldið.

Spurningurin um atlit til náttúrumargfeldið skulu takast og í hvønn mun, er sbrt. viðmerkingunum til uppskotið ein tulkingarspurningur.

Eftir uppskotinum er ikki greitt, um og í hvønn mun myndugleikin t.d. eftir løgtingslóg um djórasjúkur (djórasjúkulógin), umframt atlit at sjúkum hjá alifiski, eisini kann taka atlit at náttúrumargfeldið, tá annar myndulеiki, t.d. Umhvørvisstovan, hevur serliga fakkunnaleika at taka støðu til slíkar spurningar.

**Avleiðingar av uppskotinum**
Í viðmerkingunum til uppskotið verður um avleiðingar av § 8 um vitanargrundarlagið fyri avgerðum sagt:

"*Vitanin um margfeldið í tí føroysku náttúruni er als ikki nøktandi. Henda sannroyndin ber í sær, at skyldan eftir § 8 at byggja á vísindaliga vitan um stovnsstøðuna hjá sløgum, útbreiðsluna og tann vistfrøðiliga standin hjá náttúrusløgum og virknaðin av árinum er avmarkað. Tað er tí ógvuliga umráðandi, at farið verður undir miðvíst arbeiði at skráseta og kortleggja ta føroysku náttúruna og gera vitanina atkomandi hjá myndugleikum og almenningi. Tástani fer skyldan eftir § 8 at virka eftir sínum endamáli, tí skyldan eftir § 8 fevnir fyrst og fremst og um tøka vitan. .... "Arbeiðið at skráseta og kortleggja margfeldið í tí føroysku náttúruni er rúgvismikið og hevur leingi ligið á láni. Skal náttúrumargeldislógini fáast at virka eftir sínum endamáli, er tað tí avgerandi neyðugt at miðvíst skrásetingar- og kortleggingararbeiði verður raðfest og samskipað millum náttúrufyrisitingina og viðkomandi*

*fakstovnar undir landinum umframt granskingarstovnar, so at tann neyðuga vitanin fæst til vega."*

Í løgtingsmáli nr. 77/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um aling av fiski v.m. vístu Havstovan og Umhvørvisstovan á, at tað er lítil vitan um vistfrøðina á firðunum, og eisini vísti Heilsufrøðiliga starvsstovan á tað sama.

Í hoyringssvarunum varð nevnt, at tað er týdningarmikið, at vistfrøðin og tann ávirkan, alingin hevur, verða kannað og lýst.

Í viðmerkingunum til hetta varð sagt:
*"Landsstýrið tekur undir við, at tørvur er á meira vitan um ávirkanina, ið alivinnan hevur á vistfrøðina á firðum og sundum. Farið verður tí undir eina tilgongd saman við viðkomandi pørtum at eyðmerkja tørv á vitan og gera ætlan fyri, hvussu hendan vitanin kann fáast til vega, herundir hvør lóggáva er neyðug, og hvussu hetta skal fíggjast. Ein møguleiki er, at landið um tøkugjaldið krevur inn gjald, ið verður eyðmerkt til umhvørviskanningar og gransking. Í hesum sambandi kann upplýsast, at skipanin av tøkugjaldinum og hátturin, gjaldið er ásett, verður endurskoðað."*

**Fyrisiting av sløgum**
Í kapitli 3 "Fyrisiting av sløgum" í uppskotinum til margfeldislóg eru ásettar reglur um vill súgdjór.

Í sambandi við millumtjóða samstarv um havsúgdjór, sum Føroyar taka lut í, krevjast vitan og upplýsingar um stovnar av havsúgdjórum, m.a. í NAMMCO (North Atlantic Marine Mammal Commission) um vernd av havsúgdjórum, Bonn-sáttmálanum um vernd og umsiting av ferðandi villini djórasløg og Bern-sáttmálanum um vernd av villini djórum og blómum í Evropa og teirra natúrliga búøki.

Í USA er lóggáva sett í gildi, The Marine Mammal Protection Act (MMPA), sum setir krøv til lond, sum útflyta fisk og fiskavørur til USA. Tað snýr seg um krøv viðvíkjandi hjáveiðu av havsúgdjórum í fiskiskapi og viðvíkjandi avlíving av kópi í sambandi við alivirksemi. Krøvini skulu vera lokin innan 01.01.22. Í skiftistíðini skulu londini lata amerikonsku myndugleikunum upplýsingar um tal av havsúgdjórum, tikin sum hjáveiða í fiskiskapi og í sambandi við alivirksemi, og upplýsingar um møgulig tiltøk at bøta um støðuna hesum viðvíkjandi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tikið málið upp, og hevur saman við Fiskimálaráðnum, Náttúrugripasavninum og Vinnuhúsinum skipað ein fylgibólk at fylgja málinum upp.

Við løgtingslóg nr. 50 frá 30. apríl 2018 varð sett inn í alilógina skrásetingar- og fráboðanarskylda viðvíkjandi avlíving av kópi í sambandi við alivirksemi.

Í viðmerkingunum til uppskotið, løgtingsmál nr. 77/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um aling av fiski v.m varð m.a. sagt:

*"Eitt tílíkt avmarkað skrásetingar- og upplýsingarkrav, sum skotið er upp, er møguliga ikki nøktandi í longdini, men tað hevur týdning, at byrjað verður nóg skjótt at savna slík hagtøl, fyri*

*at fáa eina nóg langa tíðarseriu fram til freistina hjá USA í 2022. Hetta er tí eitt fyrsta stig, til tess at fáa eina nøktandi skipan viðvíkjandi verju av kópi.*

*At fáa eina nøktandi skipan í longdini krevur møguliga, at tað verður gjørd ein generel umsitingarætlan viðvíkjandi kópi, og at tað verður skapt neyðugt lógargrundarlag fyri skipanini."*

Við hesum uppskotinum varð ikki tikin støða til, í hvørji lóggávu ein møgulig generell skipan viðvíkjandi kópi eigur at vera. Havsúgdjór sum málsøki liggur hjá Fiskimálaráðnum.

Ynskiligt er, at tað skjótast gjørligt verður fingin greiða á, um uppskotið til margfeldislóg (reglurnar og heimildirnar í kapitli 3 "Fyrisiting av sløgum") kann verða neyðuga lógargrundarlagið fyri eini skipan viðvíkjandi kópi, ella tað eigur at vera ein serlig lóg um hetta.

**Ferðsla uttangarðs**
Eftir § 20 í uppskotinum kann landsstýrimaðurin forða fyri, at plantur ella dýr verða fyri skaða ella ampa við í kunngerð at áseta reglur fyri, hvussu størri tiltøk uttangarðs skulu skipast, fyri órógvandi virksemi og fyri ferðslu, sum í serligan mun kann valda skaða.

Ásetingin kann hava týdning fyri ferðavinnuna.

Vinaliga
S.P. Sørensen
Sørin Pram Sørensen
løgfr. ráðgevi